# Atassut einki formansevni enn




Enn hevur eingin sagt seg vera sinnaðan at taka við formansstarvinum í grønlendska flokkinum Atassut eftir Finn Karlsen, sum segði seg frá aftan á tað vánaliga valúrslitið hjá flokkinum fyrr í ár. Godmand Rasmussen, sum er í floksleiðsluni, hevur tó sagt, at hann er til reiðar at stilla upp sum formansevni, um eingin annar ger vart við seg. Godmand Rasmussen hevur eitt politiskt høvuðsmál, og tað er, at Grønland skal fara upp í ES. Hann sigur við kringvarpið KNR, at tað kann ikki vera rætt, at Grønland skal standa einsamalt, meðan øll onnur taka seg saman í samgongur og samveldi. Eykalandsfundur verður í Atassut um fýra vikur, og tá skal flokkurin ætlandi hava nýggjan formann.

# Varnaðust ikki flóðina

At tað kann vera vandamikið at fara út á sandin har suðuri við ta vesturjútsku strondina, fekk eitt týskt húski at sanna í gjárkvøldi. Húskið, tvey vaksin og tvey børn og ein hundur, vóru farin ein biltúr út eftir sandinum við Sønderstrand á oynni Rømø. Bráðliga varnaðust tey, at tað var farið at fløða, og at nú var sjógvur millum tey og land. Til alla lukku sóu fólk inni á landi, hvussu vorðið var, og tey varskógvaðu myndugleikarnar. Ein tyrla varð send avstað, og hon tók tey fýra fólkini og hundin upp. Tá var ov seint at bjarga bilinum, so hann kom ikki til lands fyrr enn um midnáttarleitið, tá tað var fjarðað so mikið, sigur DR.












